Jenis av Rana:

# Johan ger fólkaræðið til láturs



*Jenis av Rana úr Miðflokkinumm dugur einki stuttligt at síggja við Hinum stuttliga flokkinum.*

**Floksformenn hava trupult at taka Hin stuttliga flokkin í álvara, men tora ikki at venda honum bakið**

STUTTLIG UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

– Demokratiið er so óendaliga tolið. Tí tolir demokratiið eisini ein slíkan flokk, heldur Óli Breckmann, formaður í Fólkaflokkinum á tingi, um at Johan í Kollafirði stillar upp til løgtingsvalið við Hinum stuttliga flokkinum.

Beint tvørturímóti heldur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum. Hann dugur ikki at síggja nakað stuttligt við nýggja flokkinum yvirhøvur.

– Tað er niðurgering av fólkaræðinum. Aðrastaðni liggja lík í milliónavís eftir á í stríðnum fyri rættinum at atkvøða. Demokratiið er ov dýrabært til ein slíkan flokk, sigur Jenis av Rana.

### Vita ikki um hann er stuttligur

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, viðurkennir rættin hjá Hinum stuttliga flokkinum at stilla upp. Hann heldur, at ein slíkur flokkur kann seta fokus á mál, sum annars ikki høvdu komið fram.

– Kanska kunnu skeivir vinklar í politikki føra til, at eisini politikarar verða meiri sjálvkritiskir, sigur Høgni Hoydal, sum kortini væntar, at Hin stuttligi flokkurin man fara at koma við onkrum álvarsomu.

– Sum orðatakið sigur, so er álvara í gaman. Vit vita ikki enn, hvat flokkurin fer at standa fyri, og tí er eisini trupult at siga, hvønn leiklut hann fera at fáa í valstríðnum, sigur Høgni Hoydal.

### Hin stuttligi Javnaðarflokkurin

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, heldur seg kenna sjónarmiðini hjá Hinum stuttliga flokkinum aftur. Javnaðarfólk duga bara ikki at siga síni sjónvarmið so stuttliga, sum Johan í Kollafirði.

– Eg betrakti hin stuttliga flokkin sum stuttliga partin av javnaðarflokkinum. Johan stendur persónliga fyri nógvum sjónarmiðum, sum Javnaðarflokkurin tekur undir við, heldur Jóannes Eidesgaard

– Tú kanst siga at vit standa fyri serøsa partinum av hesum sjónarmiðum, meðan Johan stendur fyri tí skemtingarsama. Johan hevur nøkur sosial mál, hann brennir fyri og tað gera vit eisini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard viðurkennir rættin hjá Johan í Kollafirði at stilla upp, tí tað er ein demokratiskur rættur.

– Tað er ymiskt hvussu fólk siga ting. Summi siga nøkur alvorlig ting upp á ein skemtiligan hátt, meðan onnur gera umvent. Eg haldi at tað er ein ávísur álvara í tí, sum Johan sigur, sjálvt um hann sigur tað á ein stuttligan máta, heldur Jóannes Eidesgaard.

### Stúrir fyri tíðarspillu

– Jú okkurt skal eisini vera at flenna at í politikki. Vit skulu eisini hava skemt, sigur Óli Breckmann, sum sjálvur javnan roynir seg við skemti - bæði frá tingsins røðarapalli og millum fólk.

Men Óli Breckmann sær tó ein lítlan vansa við nýggja flokkinum.

– Tað verður kanska eitt sindur tyngri at avvikla politiskar fundir, tí nú verður ein flokkur meiri, sum skal hava orðið. Tá agitasjónin fer í gongd, so vil hesin nýggi flokkurin upptaka agiasjónstíð. Tó kann tað kanska fáa summi at halda, at fundartíðin tykist styttri, sigur Óli Breckmann.

## Fleiri eldar í jóla- og nýggjársvikuni

**Samanborið við einari vanligari vetrarviku, henda ofta fleiri eldar í jólavikuni og serliga í nýggjársvikuni, fyrst og fremst av adventskransum og jóladekoratiónum**

BRUNAVANDI
*Tíðindaskriv*

– Vit kunnu ikki ávara nóg mikið um tann økta eldváðan í jólamánaðinum, sigur Tryggingarfelagið Føroyar og vísir á, at sleppast kann undan nógvum eldum heima við hús, um einans øll hugsa seg væl um.

### Hugsa teg væl um - tað lønir seg

Um tú fylgir hesum ráðum kanst tú sleppa undan einum jólaeldi:

- Far ongantíð úr einum høli, har livandi ljós brenna - sovna heldur ikki frá teimum.
- Lat ikki børn ella djór vera einsamøll í hølum, har livandi ljós brenna.
- Royn altíð at nýta sjálvsløkkjandi ljós.
- Hav altíð eina kannu av vatni standandi.
- Lat ikki ljós standa tætt við tilfar, ið brennir lætt, t. d. gardinur.
- Brúka roykalarmar. Teir kunnu bjarga tær og øðrum lívinum og kanska eisini forða einum minni eldi í at gerast ein stórur eldur.

– Um eldur kemur í kortini, sum ein ikki sjálvur fær sløkt, er umráðandi at fáa øll út og ringja eftir sløkkiliðnum á telefon nr. 112, sigur Tryggingarfelagið Føroyar.

### Trygging í samband við jólaeldar

Privat- og sethúsatryggingar rinda endurgjald fyri eldskaðar og rinda eisini fyri rímiligar og neyðugar útreiðslur í samband við endurhýsing, um tað ikki er ber til at búgva í húsinum aftan á eldskaðan.

# Poul vann á Bjarta Mohr

**Fólkaflokkurin í Suðurstreymi bíðaði til seinastu løtu at almannakunngera listan og mánadagin tók Bjarti Mohr seg av listanum.**

UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Fyri jól var fólkafloksfelagið í Havn liðugt við listan til løgtingsvalið, men einhvør ósemja var um listan, tí valdi felagið ikki at almannakunngera hann.

Freistin at senda listan inn var úti týskvøldið og mánakvøldið avgjørdi Bjarti Mohr, at hann kortini ikki vildi vera á listanum. Felagið hevði gjørt listan lidnan og nevndin var samd um, hvussu listin skuldi síggja út, men so var hann broyttur í evstu løtu.

– Eg eri sera keddur av, at Bjarti Mohr avgjørdi ikki at stilla upp, sigur Aage Arnholdson, formaður í Havnar Framburðsfelag, sum fólkafloksfelagið í Havn eitur.

Aage Arnholdson vil ikki gera nakra viðmerking til, hví Bjarti Mohr avgjørdi at taka seg av listanum. Hann vísir til, at Bjarti Mohr alment hevur sagt, at hann heldur seg ikki hava tíð til at stilla upp.

### Betri møguleikar til Poul

Uttanifrá ber til at undra seg yvir, at Bjarti Mohr ikki visti tað fyri jól, men valdi at taka seg av listanum, so bert 10 valevni vera eftir. Tað kundi kanska verið ein fyrimunur fyri Fólkaflokkin at havt 11 valevni, sum hinir flokkarnir hava.

Við seinata løgtingsval fingu Óli Breckmann og Bjarni Djurholm flestu atkvøðurnar, meðan Poul Michelsen og Bjarti Mohr lógu tættir á triðja og fjóðra plássi. Poul Michelsen fekk 293 atkvøður og Bjarti Mohr 256 atkvøður. Uttanifrá kundi tað sæð út til, at møguleikarnir hjá Poul Michelsen er batnaðir munandi, nú hann ikki hevur Bjarta Mohr at kappast við.

Tey 10 nøvnini á fólkaflokslistanum í Suðurstreymi eru: Óli Breckmann, løgtingsmaður, Viðargøta 2, Argjum, Eli Christiansen, umsitingarleiðari, Miðrás 4, Tórshavn, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Millum Gilja 121, Hoyvík , Turið Christophersen, hjálparfólk, Grønlandsvegur 40, Tórshavn, Elna Skylv Hansen, ítrottarráðgevi, á Bø, Kaldbak, Jan Hansen, bygdaráðslimur, Nólsoy, Poul Michelsen, stjóri, Gundadalsvegur 19, Tórshavn, Annika Olsen, handilsskúlalærari, Blankagøta 12, Tórshavn, Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur, J. Paturssonargøta 78, Tórshavn og Torkil V. Rasmussen, lærari, Mammulág 1, Tórshavn .



# Eiga ikki at skapa ein triðja arbeiðsmarknað

**Bjørgfríð Ludvig, sum starvast í Vinnuhúsinum, heldur, at tey brekaðu so vítt sum gjørligt mugu integrerast á »vanliga« arbeiðsmarknaðinum og á jøvnum føti við onnur starvsfólk.**
**- Nøkur kunnu eftir eina royndartíð loysa uppgávur á jøvnum føti við onnur, meðan onnur møguliga skulu hava eina varda skipan restina av arbeiðslívinum**

HANDIKAPPDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bjørgfríð Ludvig segði eisini nøkur orð á altjóða handikappdegnum í Almannaráðnum, 3. desember. Hon viðgjørdi spurningin: Hvørjar møguleikar hevur ein persónur við breki á privata arbeiðsmarknaðinum?

Hon helt, at hesin spurningur kann svarast einfalt:

- Tað snýr seg um at skapa pláss fyri fólkum við breki.

Bjørgfríð segði, at spurningurin um møguleikarnar hjá hesum fólkum ikki hevur verið nógv umrøddur.



*- Tað almenna kundi í eitt stytri tíðarskeið rindað lønina hjá teimum brekaðu einar 3-6 mánaðir ella so. Eftir hetta kundi arbeiðsgevarin mett um, hvørt tann brekaði kann vera verandi í starvinum ella ikki, heldur Bjørgfríð Ludvig*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Eg haldi ikki, at fólk við breki kunnu gerast upp sum ein bólkur, tí brekini og førleikin kunnu vera so ymisk.

Hon helt, at endamálið má vera at integrera fólk við breki á »vanliga« arbeiðsmarknaðinum so vítt sum møguligt og á jøvnum føti við onnur starvsfólk.

- Nøkur kunnu eftir eina royndartíð loysa uppgávur á jøvnum føti við onnur, meðan onnur møguliga skulu hava eina varda skipan restina av arbeiðslívinum.

Bjørgfríð helt, at tað ber til at fáa fleiri brekaði út á vanliga arbeiðsmarknaðin, men neyðugt er við karmum, soleiðis at fólk kunnu fara út á arbeiðsmarknaðin og eitt nú í styttri tíð fáa løn frá tí almenna – ella varðveita sína pensjón.

- Ofta gera vit ein topdown politikk, har vit seta tað stóra apparatið í gongd. Men her kundu vit møguliga heldur valt eina praktiska loysn.

Hon helt, at ein máti at loysa hetta uppá, kundi verið, at ein persónur varð settur sum millumlið millum tey brekaðu og virkini.

- Ein háttur kundi verið at vitjað virkini og kannað eftir, hvør tørvurin er.

Bjørgfríð helt, at ein sonevnd gummu ella gubbaskipan kundi verið, har ein persónur á arbeiðsplássinum kann taka ábyrgd av tí brekaða og hjálpa og vegleiða viðkomandi, og integrera tann vinnuskerda sosialt á arbeiðsplássinum.

- Tað almenna kundi í eitt stytri tíðarskeið rindað lønina hjá hesum fólkum í einar 3-6 mánaðir. Eftir hetta kundi arbeiðsgevarin so mett um, hvørt tann brekaði kann vera verandi ella ikki.

- Vit mugu ansa eftir ikki at skapa ein triðja arbeiðsmarknað fyri tey, sum ikki kunnu fara til arbeiðis á jøvnum føti við onnur starvsfólk.

Hon helt, at ein avtala kundi verið gjørd við fakfeløgini um, at tann brekaði tekur sær av tí, sum viðkomandi nú einaferð dugir til, og síðan kundi hesin fingið løn í mun til dygdirnar.

- Talan kundi eitt nú verið um hálva løn, men slíkt eigur at metast um í hvørjum einstøkum føri.

Bjørgfríð harmaðist um, at fakfeløgini ofta síggja slíkar skipanir sum eina hóttan.

- Tí er neyðugt, at feløgini eru væl kunnaði um tað, sum gjørt verður.

Bjørgfríð Ludvig, sum umboðaði Vinnuhúsið, harmaðist um, at fakfeløgini ikki vóru við á fundinum, altjóða handikappdagin, 3. desember.

# Manningarparturin við Pison er 630.000 krónur

**- Hetta hevur verið eitt óvanliga gott ár hjá okkum og línuflotanum sum heild sigur reiðarin, Torleif Sigurðsson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað hevur gingið óvanliga væl hjá línuflotanum í ár, sigur Torleif Sigurðsson, reiðari á Pison*

Tað er stuttligt at vera fiskimaður, tá ið tað gongur so væl, sum tað hevur gjørt hjá teimum, ið sigla við línuskipinum, Pison úr Klaksvík.

Torleif Sigurðsson, reiðari, sigur, at nú árið er at enda komið, hevur skipið fiskað 1588 tons, sum eru seld fyri stívliga 22,2 milj. krónur.

- Skipið fór fyrsta túrin í árinum, 9. januar og avreiddi seinastu ferð, 14. desember.

Reiðarin sigur, at skipið hevur verið til fiskiskap 240 dagar í 2003, og manningarparturin er 630.000 krónur.

- Men her mugu vit at hava í huganum, at manningarparturin verður roknaður fyri allar túrarnar, skipið hevur gjørt, og tí er hetta ikki tað, sum manningin hevur tjent.

Hann sigur, at sjálvandi hava menn havt frítúrar, men inntøkan hjá teimum, sum hava verið flestu túrarnar við Pison, liggur omanfyri 500.000 krónur, og tað má sigast at vera rættiliga óført.

Sambært hagtølunum, liggur miðalprísurin hjá Pison fyri alt árið á sløkum 14 krónum fyri kilo.

- Jú, hetta hevur verið eitt óvanliga gott ár. Eg veit ikki um, at nakar annar línubátur nakrantíð hevur fiskað fyri eitt so stórt krónutal í eitt ár, sigur reiðarin.

Sum skilst, er Morgunstjørnan næst besti línubáturin í ár, og á triðja plássinum kemur West Freeser.

Morgunstjørnan hevur tó fiskað fyri 3,2 milj. krónur minni enn Pison.

Tað hevur annars gingið væl hjá teimum flestu línubátunum, sum hava verið í vinnu meginpartin av árinum.

- Eg haldi, at flestu skipini hava fiskað millum stívliga 1000 og uppí eini 1300 tons, og tað má sigast at vera ógvuliga gott. Veiðivirðið hjá hesum skipum liggur í miðal um einar 15-16 milj. krónur. Hetta hevur tískil verið eitt heilt óvanliga gott ár hjá línubátunum, sigur Torleif Sigurðsson.

Skipari á Pison er Petur Eliasen, sonur Vinnu og Kristian í Vági. Bæði foreldrini eru úr Klaksvík. Kristian er farin, men Vinna er á lívi.